ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Útlendsku íleggjararnir fara at stinga halan millum beinini, vinnur Ortega*
*(amerikanski handilsmálaráðharrin)*

# Gamal kenningur kemur aftur

**Nógv bendir á, at tann gamli sandinistaleiðarin Daniel Ortega fer at vinna forsetavalið í Nikaragua sunnudagin. Tað hóvar ikki USA.**

Tað var tann tíð, tá amerikanararnir sóu reytt, bara teir hoyrdu navnið Daniel Ortega. Nógv er broytt síðani, men kortini hevur amerikanska stjórnin roynt at gera sítt til, at tann gamli fíggindin ikki skal sleppa til valdið í Nikaragua. Fleiri týðandi amerikanskir politikarar hava sagt sína hugsan, og Robert Zoelick, varauttanríkisráðharri, Carlos Guiterrez, handilsmálaráðharri og amerikanski sendiharrin í Nikaragua, Paulo Trivelli, hava verið so opinskáraðir, at amerikanski eindarfelagsskapurin OAS hevur talað at.

Eitt nú hevur Paulo Trivelli sagt, at USA fer at endurskoða sína búskaparhjálp til Nikaragua, verður Daniel Ortega valdur til forseta. Guiterrez, handilsmálaráðharri, skal hava sagt, at útlendskir íleggjarar fara at stinga halan millum beinini, sleppur Ortega fram at valdinum, og republikanski kongresslimurin Dan Burton hevur sagt, at veljararnir í Nikaragua eiga at minnast áttatiárini, áðrenn teir velja Ortega til forseta. Hann hevur eisini hótt við at skerja møguleikarnar hjá nikaraguanskum borgarum í USA at senda skyldfólki í heimlandinum pengar.


*Daniel Ortega kann endurvinna forsetaembætið í Nikaragua sunnudagin.*

### Ikki tann sami

Grundlógin í Nikaragua sigur, at eitt valevni skal hava minst 35 prosent av atkvøðunum og minst fimm prosent fleiri atkvøður enn hini valevnini fyri at vinna forsetavalið, og alt bendir á, at Daniel Ortega fer at røkka hesum málunum.

Ortega sat við ræðið í Nikaragua frá 1979 til 1990. Tá tapti hann fyri einari høgrasamgongu, og tað gjørdi hann eisini í 1996 og í 2001. Men hesaferð bendir alt á, at hann fer at vinna.

Men Daniel Ortega er ikki tann, hann var, siga eygleiðarar. Í sínum valrøðum sigur hann seg hava funnið Guð, og hann brúkar ein stóran part av tíðini til at tosa um frið og kærleika og andaliga kollvelting, ið skal byggjast á kærleika og vón, sum hann málber seg. Tá tjóðartingið í síðstu viku samtykti at banna fosturtøku, tók Ortega undir við tinginum, og tað hevur gjørt, at tann katólska kirkjan styðjar hann.

### Stuðul úr USA

Hansara harðasti kappingarneyti í stríðnum um forsetaembætið er Eduardo Montealege úr teirri frælslyntu samgonguni. Hann fær stuðul frá amerikonsku stjórnini, og ein amerikanskur felagsskapur hevur fíggjað ein part av valstríði hansara. Millum hansara fremstu stuðlar er fyrrverandi amerikanski ST-sendiharrin Jeane Kirkpatrick, sum alment hevur sagt, at tað er umráðandi at forða fyri, at Daniel Ortega og venesuelski forsetin, Hugo Chavez, fáa ræðið í Miðamerika.

# Mamman og fýra døtur brunnu inni

Løgreglan í bretska býnum Accrington heldur, at eldurin var ásettur.

Tann 39 ára gamla mamman og fýra døtur, sum vóru 16, 15, 10 og 3 ára gamlar, vórðu funnar deyðar inni í húsunum. Pápin bleiv bjargaður og fluttur á sjúkrahús, men støða hansara er álvarssom.

Løgreglan í Accrington viðger málið sum eitt drápsmál, tí serfrøðingar hava funnið evni, sum gjørdu, at eldurin breiddi seg sera skjótt. Tí hevur løgreglan illgruna um, at onkur setti eld á húsini.

SløkkiliðsmaðurinMichael Frankland sigur við Sky News, at eldurin er tann ringasti tey 20 árini, hann hevur verið sløkkiliðsmaður.

– Tað var ræðuligt at bera fýra deyð børn út úr húsunum. Hetta er ein sorgarleikur og ein vanlukka fyri alt samfelagið, sigur hann.

## STUTT SAGT

### Tapti aftur

Fyri aðru ferð hevur danin Mike Axdal tapt eitt rættarmál um endurgjald í sambandi við vanlukkuna við Scandinavian Star tann 7. apríl í 1990. Mike Axdal hevði kravt, at øll endurgjøld í sambandi við vanlukkuna skuldu lagast eftir amerikonskum siði, tí eitt amerikanskt felag átti Scandinavian Star. Tí kravdi hann at fáa upp til 10 milliónir dollarar, men hann tapti í býarrættinum í Oslo. Hann legði alt fyri eitt avgerðina fyri landsrættin, men í gjár tapti hann eisini har. Niðurstøðan hjá býarrættinum og landsrættinum er, at málið er fyrnað, og ístaðin fyri amerikanskt endurgjald skal Mike Axdal gjalda 175.000 norskar krónur í sakarmálskostnaði.

### Heilsan svíkir

Elizabeth drotning í Bretlandi hevur trupulleikar við heilsuni, og í gjár noyddist hon at avlýsa nøkur almenn tiltøk, sum hon eftir ætlanini skuldi taka lut í. Talskvinna hennara gjørdi tó vart við, at drotningin er ikki illa sjúk, men at hon hevur ilt við at standa leingi. Orsøkin er, at drotningin hevur liðið av vøddapínu í rygginum síðani í tíðliga í heyst. Elizabeth hevur kortini ongar ætlanir um at fara frá ella at taka seg burtur úr almennum tiltøkum, sjálvt um tað kann vera strævið. Sambært hóvinum tók drotningin lut í 378 ymsum tiltøkum í fjør.

### Fekk hjálp

Í nátt eydnaðist at gera fast á boripallin Bredford Dolphin, sum hevur rikið fyri vág og vind í Norðsjónum síðani týsnáttina, tá endin millum pallin og ein sleipibát slitnaði í ódnarveðri. 75 fólk eru umborð á pallinum, men tey hava ikki verið í havsneyð, sigur norska bjargingartænastan. Bredford Dolphin kláraði at liggja uppí við egnari maskinorku, men hann rak kortini lagt undan ættini, áðrenn tað eydnaðist at gera fast á hann aftur. Bredford Dolphin, sum er skrásettur í Singapore, er á veg til Pólands, har hann skal umvælast.